# Yvirlæknarnir vilja hava stjórastarvið tikið aftur

*Starvið sum sjúkrasystrastjóri á Landssjúkrahúsinum skal takast aftur. Tað er treytin fyri at serlæknarnir taka samráðingarnar um leiðsluna á teimum ymsu deildunum á Landssjúkrahúsinum, uppaftur*

Áki Bertholdsen

–Nú fer tað at taka minst eitt, kanska tvey ár, áðrenn ein nýggj leiðsla kann setast í verk á Landssjúkrahúsinum.

Jóhan Petur Davidsen, formaður í serlæknafelag Føroya er rættiliga dapurskygdur um støðuna á Landssjúkrahúsinum eftir gongdina hesar seinastu dagarnar.

Fyrst var Jákup Mørkøre sagdur upp.

Og síðani endaði ein fundur ímillum Serlæknafelagið og Helenu Dam á Neystabø um nýggja leiðslubygnaðin á Landssjúkrahúsinum fullkomiliga úrslitaleysur.

Og alt hetta heldur Jóhan Petur Davidsen var eitt álvarsligt bakkast fyri arbeiðslagið á Landssjúkrahúsinum.

Tí nú er hann vísur í, at tað fara at ganga í hvussu so er eitt, kanska tvey ár, áðrenn vit fáa skipað viðurskiftið á Landsjúkrahúsinum.


*Ein loysn á ósemjuni um leiðsluna á Landssjúkrahúsinu, er kanska longrui burturi nú, enn hon hevur verið leingi, sigur Jóhan Petur Davidsen, formaður í serlæknafelagnum*

### Ein marra

Ósemjan ímillum sjúkrasystrarnar og læknarnar um, hvør skal hava ovastu leiðsluna á Landssjúkrahúsinum hevur í nógv ár riðið okkara høvuðssjúkrahúsi sum ein marra og enn hevur ongin politikari megnað at loyst knútin.

Serlæknarnir vilja onki annað góðtaka enn eina einstreingjaða leiðslu, har eitt einsmalt fólk hevur endaligu ábyrgdina, ikki minst niðri á deildunum sjálvum, ahr tað dagliga arbeiðið fer fram.

Teir halda nevniliga, at tað er heilt avgerandi, at tað ber til at leggja endaligu ábyrgdina hjá einum einsamøllum leiðara, tí annars verða viðurskiftini ikki nóg greið.

Og ábyrgdina sum ovastu leiðari halda teir, at ein lækni hevur bestu fortreytirnar at røkja.

Hinvegin vilja sjúkrasystrarnar onki góðtaka uttan eina tvístreingjaða leiðslu, har ein sjúkrasystir skal vera í ovastu leiðsluni á jøvnum føti við læknan og tey skulu so hava ábyrgdina í felag, eisini niðri á deildunum.

Tí tær siga, at tað ber væl til at býta ovastu leiðsluna sundur, um samstarvsvilji er til staðar, so at sjúkrasystirin fær ábyrgdina av røktini og læknin ábyrgdina av viðgerðini, tí tað eru heilt hvør síni arbeiðsøki.

Og eftir eitt politiskt talv í nógv ár, endaði tað við, at Helena Dam á Neystabø skar ígjøgnum og gjørdi av, at tað skuldi vera ein tvístreingjað leiðsla ovast á Landssjúkrahúsinum.

Hendan ovasta leiðslan skuldi síðani stinga út í kortið, hvussu leiðslan skuldi skipast longur niðri á teimum ymsu deildunum.

### Álitiskreppa

Men serlæknarnir vilja ikki taka lut í hesum arbeiðnum.

Og teir hava blokerað fyri lýsingini eftir læknastjóra og tí hevur tað ikki borið til so mikið sum at lýsa eftir honum enn.

Hinvegin varð søkt eftir sjúkrasystrastjóra. Hann er nú settur og tekur við starvinum 1. apríl.

Síðani hevur málið ligið mestsum í dvala. Líka inntil nú týsdagin, tá ið fundur var aftur ímillum serlæknarnar og landsstýrismannin í almanna og heilsumálum um leiðsluviðurskiftini á Landssjúkrahúsinum.

Á hesum fundinum endurtóku serlæknarnir, at teir fara ikki at taka lut í leiðsluni, sum ætlanin nú er at seta í verk

Og í einum brævi, sum teir handaðu Helenu Dam á Neystabø siga serlæknarnir, at teir dylja ikki fyri, at í løtuni fyriliggur ein álitiskreppa, sum kann fáa álvarsligar fylgir fyri samskiftið millum serlæknarnir og tann politisk-fyrisitingarliga myndugleikan.

– Í hvønn mun, og hvussu, hetta samskiftið skal fara fram, verður støða tikin til í hvørjum einstøkum føri, siga teir

Teir boða eisini frá, at læknarnir hava samtykt at seta á stovn eitt yvirlæknaráð

Og sum støðan er skulu allar áheitanir og fyrispurningar frá fyrisitingarliga myndugleikanum til yvirlæknarstílast til yvirlæknaráðið,

Fyribils er tað Jóhan Petur Davidsen sjálvur, sum umboðar ráðið.

### Stjórastarvið skal takast aftur

Formaðurin í serlæknaráðnum vil ikki útgreinað, akkurát, hvussu orðaljóðið í brævinum skal skiljast.

Men hann dylir ikki, at hann er dapurskugdur um gongdina.

Nú er leiðarin á Landssjúkrahúsinum sagdur upp og tað fer at taka einum nýggjum leiðara minst eitt, ella kanska tvey ár, at arbeiða seg ígjøgnum alt málið, og at seta seg inn í øll viðurskiftini, so at vit kunnu koma víðari.

Jóhan Petur Davidsen hevur ikki nógv gott at bera tí bygnaði, sum Helena Dam á Neystabø hevur sett í verk.

– Hetta er einki uttan ein politisk neyðloysn, sum bara er eitt óneyðugt og nógv dýrkandi millumlið.

–Tað, sum vit veruliga hava brúk fyri, er at skipa ein greiðan leiðslubygnað niðri á sjálvum deildunum. men tað fyriliggur ikki eitt orð um tað enn.

Serlæknarnir siga, at teir eru sinnaðir at taka upp samráðingar við almanna- og heilsumálastýrið um, hvussu leiðslan niðri á deildunum skal skipast.

– Men treytin er, at setanin av sjúkrasystrastjóranum verður tikin aftur, sigur Jóhan Petur Davidsen.

# Helena er framvegis bjartskygd

Áki Bertholdsen

– Eg eri framvegis bjartskygd.

Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, hevur ikki mist mótið aftaná fundin við serlæknarnar týsdagin.

Sum nevnt í greinini omanfyri, vilja serlæknarnir framvegis ikki taka lut í arbeiðnum at skipa leiðsluna á Landssjúkrahúsinum eftir tí leisti, sum Helena Dam á Neystabø, hevur skorið.

Men Helena Dam á Neystabø sigur, at hon hevur sett sær fyri at loysa málið og tað stendur við. Og hon væntar framvegis, at tað fer at bera til at finna eina loysn á ósemjuni, sum øll verða nøgd við. Hon vísir á, at Landssjúkrahúsið er eitt ómetaliga fjøltáttað arbeiðspláss við yvir 680 starvsfólkum, sum arbeiða eftir 28 ymsum sáttmálum.

– Og á einum so stórum arbeiðsplássi sigur tað seg sjálvt, at tað er neyðugt at hava ein greiðan leiðslubygnað. Hetta er eitt mál, sum fleiri landsstýrið hava drigist við og enntá skumpa undan sær, sigur Helena Dam á Neystabø. Men tíverri gongur tað ikki so skjótt, sum hon hevði vónað.

Tað, at læknarnir taka so harðliga til orðanna ímóti tí bygnaði, sum ætlanin er at seta í verk, heldur hon er natúrligt.

– Í fakfelagsligum stríði leggja fakfeløg ofta harðliga fyri,tá ið tey skulu verja síni rættindi, sigur Helena Dam á Neystabø.

Meiri heldur hon ikki liggur í orðunum um álitiskreppu, tí á fundi ímillum partarnar er tónlagið eitt heilt annað og nógv betri.

Og hon skilir væl, at teir eisini leggja trýst á fyri at finna eina loysn nú.

– Eg hevði bara vóna, at teir vildu vera við til at stinga út í kortið, hvussu leiðslan niðri á deildunum skal skipast.

*Merkir hetta, at tað nú kann koma uppá tal at seta eina leiðsluskipan í verk, uttanum læknarnar?*

–Tað havi eg onga viðmerking til. Men læknarnir hava gjørt síni sjónarmið greið og tey eru tikin við í metingunum fyri tað víðari arbeiði.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað hevur verið ógvuliga oyðileggjandi fyri allar partar á Landssjúkrahúsinum, at tað hava gingið so nógv ár at fáa leiðsluviðurskiftini í rættlag.

Men hon væntar framvegis, at tað fer at eydnast at finna ein bygnað á deildunum, sum allar partar kunnu góðtaka.

Og hon væntar heldur ikki, at tað fer at taka eitt, kanska tvey ár, sum formaðurin í serlæknafelagnum stúrir fyri í greinini omanfyri.

Nógv uppskot eru frammi, men nú ræður um ikki at elva til meiri stríð, so hon sigur onki um tað.

*Men fyri at vera við í samráðingunum um leiðsluviðurskiftini á deildunum, krevja serlæknarnir, at setanin av sjúkrasystrastjóranum verður tikin aftur?*

– Tað málið er ikki partur av samskiftinum við fakfeløgini. Tann avgerðin er tikin og avgreitt eftir galdandi reglum og setanin er ein partur av samráðingum, sum vóru frammanundan.

Og tað kann ikki koma uppá tal at taka setanina aftur.

– Læknarnir treytað sær at teir fáa ein bygnað á deildunum, sum teir kunnu góðtaka, og tað vænti eg eisini, at vit fáa, sigur Helena Dam á Neystabø.

*Var tað rætt at seta sjúkrasystrastjóran, áðrenn læknastjórin var settur, tí báðir stjórarnir eru partur í eini heild?*

Til hetta svarar Helena Dam á Neystabø, at hon helt, at viðurskiftini við serlæknarnar vóru so greið, at tað eisini kundi søkjast eftir læknastjóra.

Men so tóku teir eina aðra støðu og blokeraðu starvið sum læknastjóra og at tað tí ikki kundi lýsast eftir læknastjóranum.


*– Tað kemur ikki uppá tal at taka setanina av sjúkrasystrastjóranum aftur, sigur Helena Dam á Neystabø*



# Norðuratlantska Bryggjan veruleiki

*Nú grunnurin hjá A. P. Møller játtaði ætlanini 20 milliónir krónur í stuðuli, kann Vígdis Finnbogadóttir eykkaleys leggja ætlanina fram fyri Mogens Lykketoft, sum endaliga skal góðkenna ætlanina um norðuratlantiska mentanardepilin í Keypmannahavn*


*Á gamla Grønlendska Handilsplássinum í Keypmannahavn fer mentanardepilin at húsast*

Eirikur Lindenskov

Við eini tilsøgn um stuðul upp á 20 milliónir krónur til stovnanina av einum norðuratlantiska miðdepli í tí gamla íslendskt grønlendska pakkhúsinum í Strandgade í Keypmannahavnar havn, hevur »A. P. Møller og hustru Chastine Mærk Mc-Kinney Møllres Fond til almene Formaal« nú tryggja fíggjarliga grundarlagið, soleiðis at ætlan gerst veruleiki.

Tann 11. mai 1999 gav danska stjórnin tilsøgn um at lata pakkhúsið til tað Norðatlantisku Bryggjuna - ein miðdepil fyri mentan, gransking og vinnu á »den gamle Grønlandske Handels Plads«.

Tilsøgnin var - umframt góðkenning frá játtanarmyndugleikunum - treytað av, at nevndin aftan fyri ætlanina kundi útvega neyðuga stuðulin frá norðuratlantisku stjórnunum eins og tryggja fulla fígging av ætlanini.

Við hesum grundarlag hevur nevndin við forkvinnuni, fyrrverandi íslendska forsetanum, Vígdis Finnbogadóttir á odda, vent sær til grunnin hjá A. P. Møller um stuðul.

Hetta hendi eftir, at tilsøgn varð givin frá teimum luttakandi, íslendsku stjórnini og landsstýrunum í Føroyum og í Grønlandi.

Grunnurin hjá A. P. Møller hevur boðað Vígdis Finnbogadóttir frá, at grunnurin stuðlar ætlanini við 20 milliónum.

Tá tilsøgn samstundis er fingin um realkredittlán til umvælingina, er við stuðlinum frá A. P. Møller fíggingin tryggað til neyðugu útreiðslurnar stovnan av miðdeplinum. Samstundis tryggjar stuðulin, at tann norðatlantiska Bryggjan eftir umvælingini fíggjarliga kann hvíla í sær sjálvum.

– Við hesum stuðlinum hevur grunnurin hjá A. P. Møller tryggjað fíggjarliga grundarlagið av Norðuratlantisku Bryggjuni á gamla Grønlendska Handelplássinum og samstundis stuðla stóru hugsjónunum um skapanina av eini felags miðstøð fyri norðatlantiska mentan, gransking og vinnu í Keypmannahavn.

– Eg veit, at tann Norðuratlantiska Bryggjan fer at hava stóran lut í menningini av sterku bondunum, sum eru millum lond okkara, segði Vígdis Finnbogadóttir.

– Hetta er bæði gávumikið og ógvuliga framskygt av Hr. Mærsk Mc-Kinney Møller at stuðla hesi ætlan, segði hon, tá tað frættist um avgerðina hjá grunninum.

Nevndin fyri Bryggjuna gleðir seg at hitta danska fíggjarmálaráðharran seinni í mánaðinum, tá positiva úrslitið skal leggjast fyri hann til góðkenningar.

# Undir somu lon…

Norðurlendski mentanarmiðdepilin skal vera í gamla pakkhúsinum frá 1767, haðani danska hjálandasøgan í útnorðri er farin ígjøgnum. Her eru turri fiskurin og hvalirnir skipaðir inn. Revsifangar frá teim gomlu hjálondunum, sum skuldu sita tíðina í Danmark, eru eisini farnir ígjøgnum har. Skipini hava lagt at, og tað krevur ikki nógv hugflog at ímynda sær tann ruðuleika av lívi og handli, sum er farin fram har. Sjálvt pakkhúsið er væl hildið við líka - takkað verið góða viðinum og byggisiðinum, sum var tá. Tað hevur staðið tómt síðani fyrst í áttati árunum, tá ið tann kongligi grønlendski handilin fór út og tók síðstu vørurnar í stóra goymslubygninginum við sær.

Tá ið umvælingarnar eru fingnar frá hondini, skuldi hesin 7.000 fermetra stóri bygningurin staðið klárur at hýst øllum teim mentanarligu brigdunum úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Danmark.


*Her kunnu vit ímynda okkum, hvussu turrur fiskur, føroyskar troyggur, hosur – og fangar, hava verið skipað upp í gomlum døgum. Nú er hetta mentan…*

Ætlanin er, at vinnulívið skal vera primus motor í menningini av húsinum, tá ið tað stendur liðugt. Nevndin roknar við, at umleið 75 prosent av húsinum verða leigað út til vinnulig endamál úr Norðuratlantshavi, soleiðis, at um tú keypir grønlendskan gandagrip, føroyskan turran fisk og íslendskar troyggjur, so fert tú onga aðra staðni enn í Pakkhús C á Bryggen.

Hini 25 prosentini av húsinum skulu brúkast til feløg, søvn, stovnar og hvat tú annars kannst ímynda tær av norðuratlantiskum felagsskapum, sum í løtuni eru spjaddir um alt Keypmannahavn. Her verður alt savnað. Umframt verða kaffistovur, framsýningar og serbúðir.

– Ein nýggjur miðdepil fyri gomlu handilsmentanina…


EIMSKIP CUP 2000

Havnar Bóltfelag bjóðar
øllum gentum og dreingjum
til innandurakapping í fótbólti
í høllini á Hálsi
í døgunum 28.-29. januar 2000



**Aldursbólkar:**

| | | |
|---|---|---|
| Gentur | 10-12 | (f. 1988-1989) |
| Smágentur | 12-14 | (f. 1986-1987) |
| Gentur | 14-17 | (f. 1983-1985) |
| Smápiltar | | (f. 1990-1991) |
| Piltar | | (f. 1988-1989) |
| Smádreingir | | (f. 1986-1987) |
| Dreingir | | (f. 1984-1985) |
| Unglingar | | (f. 1981-1983) |

Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum gentur 14-17 ár, dreingir og unglingar eru bert 4 leikarar. Loyvt er at hava ein skiftisleikara. Luttøkugjaldið er kr. 200,- fyri liðið. Liðini skulu hava eitt fótbóltsnavn (t.d. HB, Arsenal, AB). Eimskip, ið stuðlar kappingin, letur heiðursmerki til trý tey bestu liðini í hvørjum aldursbólki.

**Seinasta freist at melda til er mikudagin 26. januar.**

**Tilmelding hjá:** Oddmar Andreasen Tel. 28 33 46
Tel. 31 07 60 eftir kl. 18.00
Pætur Clementsen Tel. 31 56 16

HB 1904 Havnar Bóltfelag

Sosialurin - 311820